SEMJA MILLUM BÚSKAPAR- OG LØGFRØÐINGAFELAG FØROYA OG FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ 1. MARS 2001 TIL 1. OKT. 2003

**1. Sáttmálaskeið**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. mars 2001 til 1. oktober 2003 við broytingunum, sum standa niðanfyri.

**2. Lønin**

Nýggi lønarstigin verður broyttur frá 1. mars 2001

Hækkingarnar í nýggja stiganum eru:

1. mars 2001 hækkar lønin 5,0%
1. mars 2002 hækkar lønin 3,0%
1. mars 2003 hækkar lønin 2,5%

Hækkingarnar í gamla stiganum eru:

1. mars 2001 hækkar lønin 5,0%
1. mars 2002 hækkar lønin 3,6%
1. mars 2003 hækkar lønin 2,5%

**3. Reiðiskylda og reiðiviðbót**

1. januar 2002 lækkar reiðiskyldan úr 35 tímum niður í 25 tímar.

Sum § 24, stk.. 2 verður sett inn:

1. mars 2001: "Teir fyrstu 35 áløgdu úrtíðartímarnir hvønn ársfjórðingin eru tó samsýntir í lønini."
1. januar 2002: "Teir fyrstu 25 áløgdu úrtíðartímarnir hvønn ársfjórðingin eru tó samsýntir í lønini."

Reiðiviðbótin verður løgd afturat grundlønini.

Arbeiðsbólkur verður settur at hyggja at trupulleikum viðvíkjandi reiðiskyldu og flex-skipanum.

**4. Broytingar í sáttmálatekstinum**

§ 6, stk. 1 verður soljóðandi: "Í eftirløn verða goldin 15% av lønini, ið gevur eftirløn."

§ 6, stk. 2 verður strikað.

**5. Protokollat um nýggjar lønarskipanir**

Eru stovnar, sum í sáttmálaskeiðnum eru áhugaðir at fara undir staðbundnar royndarskipanir við nýggjum lønarskipanum, fara partarnir við vælvild at virka fyri tí.

**6. Avtala um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu**

Tað er týðandi, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligar menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit til sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um, at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

- *Førleikamenning*
- *Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum*
- *Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum*
- *Javnstøða*

Víst verður til hjáløgdu avtalu um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum.

*24. september 2001*

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya        Fíggjarmálastýrið